# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# ÁBYRGDIN SKAL MIÐSAVNAST

Tað má sigast at vera upp á tíðina, at okkurt veruligt verður gjørt við tilbúgvingina í samband við oljudálking. Hóast fleiri kommunur eru illa royndar av ógvusligum oljudálkingum, so tykist kjakið um samskipaðu tilbúgvingina at dovna so hvørt, sum fólk hava gloymt hendingarnar. Vit kunnu nevna hendingina tá Olshana sakk í Tangafirði, ella tær ferðirnar, tá SEV hevur dálkað Vágsfjørð. Nógv tos, men einki hendir.

Men nú slær Kommunusamskipan Føroya nevan í borðið. Her í blaðnum mánadagin segði Eyðun Christiansen, aðalskrivari í Kommunusamskipanini, at nú skal full greiða fáast á, hvør hevur ábyrgdina, og hvør ið skal hava ábyrgdina av upptakinum, tá ein stór oljudálking verður í Føroyum. Sum støðan er nú, so eru tað kommunurnar, sum hava ábyrgdina, men hetta vilja tær – sum vera man – ikki góðtaka. Tilbúgvingarnar hjá kommununum eru heilt einfalt ikki førar fyri at at basa eini umfevnandi oljudálking, hóast tær samstarva væl tvørtur um kommunumørk.

Oljudálkingarnar kosta kommununum nógvar pengar, tí tær mugu leggja út, og tá dálkarin ikki verður funnin, so er eingin at senda rokningina til. Men tað sum órógvar kommunurnar er, at um vit verða rakt av eini umfatandi oljudálking, so eru vit prísgivin. Og vandin er til staðar. Vit hava stórar oljugoymslur á landi, sum vit av beiskum royndum vita ikki eru nóg tryggar, og stór tangaskip sigla fram við okkum.

Tað er væl skilligt, at kommunurnar ikki vilja sita við hesi ábyrgd. Og tað gevur heldur ikki serliga meining, at kommunur hvør í sínum lag skulu skipa dýrar tilbúgvingar, sum sjálvandi natúrliga áttu at verið samskipaðar á einum stað - og undir landinum.

Tá Olshana sakk kom so týðuliga til sjóndar, hvussu illa vit eru fyri. Har var eingin skipað tilbúgving, men farið var fram eftir fummum. Nógv tos var um stóra vandan, tá oljan fór til botns við Olshanu, men eingin veit enn, hvussu nógv olja kom úr vrakinum - ella hvussu nógv olja fer at koma.



Fyribyrging er sjálvandi besta trygdin fyri at tann stóra vanlukkan ikki skal henda. Men tá vit vita, at vandin lúrir, so eiga vit at hava eina góða tilbúgving, so vit eru tilreiðar. Tí kunnu vit bara vóna, at Kommunusamskipan Føroya fær ljóð fyri sínum ynskjum um eina samskipaða tilbúgving, so ábyrgdin verður lyft av herðum kommunanna.

**Kemur ein stór oljudálking, eru vit prísgivin**

---

# Fyrilestur um migrenu í Miðlahúsinum



Í annaðkvøld 3.juni klokkan 19 fer danski sálarfrøðingurin, Tonny Andersen, at hava almennan fyrilestur um migrenu, pínuhandfaring og pínuviðgerð. Hann er serfrøðingur í pínu og umframt at arbeiða við at hjálpa fólki við migrenu, hevur hann seinastu tíðina eisini arbeitt við fólki, ið hava pínu orsakað av piskesmæld.

At hava migrenu inniber í minni ella størri mun at hava ógvisliga pínu í aðrari helvtini av høvdinum, og tað eru nógv fólk við migrenu, ið ikki megna at dagligar uppgávur og at hava eitt starv, orsaka av ringari pínu. Tað eru fleiri kvinnur enn menn, ið hava migrenu. Tað eru nógv sløg av migrenu og ógvuliga ymiskt, hvussu fólk verða rakt av sjúkuni. Summi eru nógv verri fyri enn onnur.

Í Føroyum eru nógv, ið stríðast við migrenu, og tí hevur danska sjúklingafelagið hjá migrenusjúkum fólki, sett á stovn ein føroyskan migrenubólk, ið hevur til endamáls at stuðla fólki við migrenu, at skipa fyri kunnandi tiltøkum um migrenu og annars virka sum ein hjálparbólkur, har fólk kunnu hittast og tosa saman um støðuna og fáa góð ráð og stuðul frá hvørjum øðrum. Limirnir hittast av og á, mest í Havn, men eisini úti á bygd.

Tiltakið í Miðlahúsinum hevur til endamáls at savna so nógvar føroyingar sum gjørligt, bæði migrenusjúk og teirra familjur, vinfólk og avvarandi annars. Høvi verður at fáa nýggjast vitan um pínu, pínuhandfaring og pínuviðgerð. Eisin kunnu fólk seta Tonny Andersen spurningar. Føroyski migrenubólkurin vónar at síggja nógv fólk til tiltakið.

Tiltakið er ókeypis og øll eru vælkomin, siga fyrireikararnir, sum er Føroyski migrenubólkurin og Migrænikerforbundet www.migraeniker.dk



**Lítið kvink rætta vegin**

ROLF GUTTESEN
KJAK Á SÍÐU 12



**Veðrið avlýst**

HELGI ABRAHAMSEN
KJAK Á SÍÐU 14

# Skaðilig nýtsla av rúsdrekka

Í kvøld klokkan 19 til 21 verður tiltak í Miðlahúsinum, nevnd »Rúsdrekkatrupulleikar ávirka alla familjuna«. Tað er Birgit Trebacz, sum fer at greiða frá.

»Kann eg gera mun«, er heiti á skeiði, sum Birgit Trebacz hevði mánadagin. Hon fer í kvøld at greina orðið rúsdrekkabundinskapur og skaðilig nýtsla av rúsdrekka. Somuleiðis fer hon at greiða frá, hvussu vit kunnu stuðla børnunum og teim ungu, tá misnýtsla er í heiminum.

Birgit hevur skrivað fleiri bøkur um júst hesi evni og hevur fleiri ára royndir innan arbeiði við avvarðandi. Les meiri á heimasíðu hennara www.trembacz.dk



**Sosialurin**

Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,** sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*